## Búskapur og vinna:
## Fiskarok

Danska stjórnin er í øðini um, at ES-nevndin hevur vrakað eitt uppskot um ein nýggjan ES-fiskivinnupolitikk. Uppskotið skuldi leggjast fram í dag, men tað eydnaðist teimum suðurevropeisku londunum við Spania á odda at forða tí.

Danski matvørumálaráðharrin, Marianne Fischer Boel, sum umsitur fiskivinnumál, er í øðini um avgerðina, tí hon vil vera við, at ES-nevndin hevur slakað fyri einum órímiligum sponskum trýsti. Danmark hevur tí við stuðuli frá Svøríki, Bretlandi, Hollandi og Týsklandi kravt, at málið verður tikið framaftur. Marianne Fischer Boel segði mánadagin, at nevndin hevur svikið og tað í ólukkumát. Hon helt mistakið hjá nevndini vera so álvarssamt, at vil nevndin ikki broyta støðu, eigur hon at fara frá.

Uppskotið til ein nýggjan fiskivinnupolitikk ber m. a. í sær, at umleið helmingurin av fiskiførunum í ES skulu høggjast upp. Hetta hevði serliga rakt Spania meint, og tí er spanska stjórnin ímóti. Uppskotið sigur eisini, at ES skal skerja stuðulin til fiskivinnuna, samstundis sum tað setir mark fyri, hvussu nógv tey einstøku limalondini kunnu fiska. Heldur ikki hetta vil Spania góðtaka. Londini í Norðurevropa siga hinvegin, at skerjingin er neyðug fyri at bjarga fiskastovnunum og harvið fiskivinnuni sum heild.

## Stálstríð harðnar

Stálstríðið millum USA og ES er harðnað seinastu dagarnar, men samstundis hevur tað víst seg, at semjan millum ES londini um at seta hart ímóti hørðum ímóti USA er ikki so sterk, sum hon hevur verið. Tað er svenska stjórnin, sum hevur hug at draga í land. Svenski handilsmálaráðharrin segði í gjár, at stjórnin ber ótta fyri, at stálstríðið kann enda sum eitt veruligt handilsstríð, og tí hevur Svøríki ongan áhuga í, segði hann.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Blair ávarar ímóti høgraráki í Bretlandi

**Framgongdin hjá tí víðgongda høgramanninum Jean-Marie Le Pen í Fraklandi órógvar leiðandi bretskar politikarar, sum ávara ímóti at lata franska høgrarákið koma yvir um Ermasund**




*Myndir sum hendan frá mótmælandi fransmonnum hava elvt til ótta millum bretskar politikarar*

BRETLAND
*Árni Joensen*

Teir fyrstu dagarnar aftan á fyrra umfarið í franska forsetavalinum vildi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, ikki gera nakrar viðmerkingar til ta stóru framgongdina hjá Front National og Jean-Marie Le Pen. Grundgeving hansara var, at tað vóru fransmenn, sum vóru á vali, og at fronsku veljararnir áttu avgerðina.

Men nú hevur Blair kortini valt at lata munnin upp. Í morgin eru lokalval ymsastaðni í Bretlandi, og í fjølmiðlunum hevur Blair ávarað fólk ímóti at velja valevni, sum eru uttast á bretska høgravonginum, og sum hava sjónarmið, ið líkjast teimum hjá Le Pen.

Politiskir eygleiðarar í London siga, at júst teir víðgongdu hava góðar møguleikar á bretska lokalvalinum. Hetta kemst av, at valluttøkan vanliga er ógvuliga lítil ella umleið 25 prosent, og tí kunnu teir víðgongdu sum eitt nú flokkurin British National Party fáa lutfalsliga stóra undirtøku.

Bretsku politikararnir hava eisini orsøk til at stúra. Ein meiningakanning, sum varð almannakunngjørd nú um dagarnar, vísti, at 66 prosent av teimum spurdu eru misnøgd við tann politikk, sum stjórnin hevur rikið í spurninginum um tey fremmandu og innflytarar.

British National Party stillar upp í 68 valdømum í morgin, og hildið verður, at flokkurin fer at fáa stóra undirtøku í teimum fátæku býunum í útnyrðingspartinum av Onglandi so sum Oldham, Burnley og Bradford. Í hesum býunum búgva tey, sum eru av asiatiskum uppruna, í egnum býlingum, og viðurskiftini millum tey og onglendingarnar í býunum eru ógvuliga spent. Tað var júst í hesum býunum, at harðir samanbrestir vóru í fjør millum onglendingar og asiatar, og sagt verður, at British National Party hevði ein virknan lut í ófriðinum.

Í einari røðu mánadagin ávaraði Tony Blair fólk ímóti at atkvøða fyri British National Party. Hann segði, at vildu tey ikki atkvøða fyri hansara egna flokki Labour, áttu tey at atkvøða fyri teimum liberalu ella teimum konservativu. Bara ikki BNP.

Valið í morgin fer at vísa, at veljararnir lurta eftir ávaring hansara og ávaringini úr Fraklandi.

# FBI bar ótta fyri yvirgangi umborð á flogfari

**Eitt flogfar hjá amerikanska flogfelagnum US Airways fekk boð um at venda aftur, tí trý av ferðafólkunum líktust arabarum og høvdu bert keypt einvegis ferðaseðil, sum tey høvdu goldið í hondina**

USA
*Árni Joensen*

Flogfarið hjá US Airways var á veg úr Philadelphia til Orlando í Florida, tá embætismenn hjá samveldisløgregluni FBI vórðu kunnaðir um tey trý ferðafólkini og ferðaseðlakeyp teirra.

FBI gav alt fyri eitt flogskiparanum boð um at venda aftur, og tá flogfarið við teimum 134 ferðafólkunum lendi aftur í Philadelphia, fóru løgreglumenn umborð eftir teimum trimum ferðafólkunum. Samstundis leitaðu servandir bumbuhundar eftir spreingievnum umborð á flogfarinum.

Talskvinnan hjá FBI, Linda Vizi, sigur, at myndugleikarnir bóru ótta fyri, at tey trý ferðafólkini kundu hava ætlanir um eina yvirgangsatsókn, og at flogfarið tí fekk boð um at venda aftur. Tey trý ferðafólkini, tríggir menn, vórðu avhoyrd og síðani latin leys.

Aðrar amerikanskar keldur vistu mánadagin at siga frá, at tvey onnur amerikansk ferðamannaflogfør fingu boð um at venda aftur sunnudagin. FBI vil ikki gera nakrar viðmerkingar til tey tíðindini.

## Úr Norðurlondum:
## Einki verkfall

Spenningurin var sera stórur, tá danska semingskvinnan Matte Christensen klokkan níggju gjáramorgunin skuldi almannakunngera, hvussu tey 650.000 starvsfólkini hjá kommunum og amtum høvdu atkvøtt um semingsuppskotið, sum hon legði fyri partarnar herfyri. Frammanundan var greitt, at tað fór at enda ógvuliga javnt, og úrslitið vísti eisini, at 51,9 prosent høvdu atkvøtt fyri semingsuppskotinum, meðan 48,1 prosent høvdu atkvøtt ímóti.

Serliga lærarar og sjúkrasystrar vóru ímóti semingsuppskotinum, meðan flestu skrivstovufólkini tóku undir við tí. Tann nýggi sáttmálin gevur starvsfólkunum hjá kommunum og amtum 5,5 prosent meiri í løn og tveir eyka frídagar um árið.

## Roykibann

Norski heilsumálaráðharrin Dagfinn Høybråten hevur boðað frá, at hann fer at leggja fram eitt lógaruppskot, sum skal seta fólki bann fyri at roykja inni á matstovum. Samstundis hevur ráðharrin gjørt greitt, at tað kemur ikki upp á tal at geva undantaksloyvi frá roykibanninum. Dagfinn Høybråten sigur, at bannið skal verja teir matstovugestirnar, sum ikki roykja. Sambært hagtølum doyggja millum 300 og 500 norðmenn um árið av tí, sum verður rópt passiv royking.

## Einki gass

Ein umfatandi norsk ætlan um at selja Pólandi gass er eftir øllum at døma løgd á hyllina. Í heyst fekk Póland nýggja stjórn, og hon hevur ikki víst seg at hava sama áhuga fyri norska gassinum sum tann undanfarna stjórnin. Norðmenn ætlaðu at leggja eina rørleiðing til Pólands, og at fimm mia. rúmmetrar av gassi skuldu fara ígjøgnum leiðingina um árið.



# Dansikvøld við Heidi Hauge



**Áhoyrarar streyma til konsertirnar og dansikvøldini saman við Heidi, og ikki so sjáldan er neyðugt at steingja hurðarnar, tí fultsett er**

TÓNLEIKUR
*Vilmund Jacobsen*

Kenda norska countrydrotningin, Heidi Hauge, kemur til Føroya í juni. Tað eru Tvøroyrar Bóltfelag, TB, og Kaggin, sum skipa fyri.

7. juni verður dansur í Ítróttarhøllini í Trongisvági, og 8. juni verður dansað í Ítróttarhøllini á Hálsi.

**Tríggjar ferðir gull**

Sagt verður um Heidi Hauge, at hon at kalla gjørdist kend eftir einari nátt sum norsk countrydrotning.

Hon er uppvaksin í norska býnum, Skien, har hon og maður hennara, kapelmeistarin, Bjørn A. Hauge, búgva og eru sera væl umtókt.

Fyrsta fløgan hjá henni, Country Time, sum kom út í 2000, er seld í fleiri enn 25.000 eintøkum og selir framvegis. Sølan av næstu fløguni, Country Rose, sum kom í 2001, táttaði eisini í tey 25.000 eintøkini eftir bert tveimum mánaðum. Í juni 2001 kom Heidi aftur við einari fløgu, Country Girl, og hendan selir eisini sum heitt breyð – og ikki minni væl enn hinar báðar fyrru.

Heidi hevur sostatt givið út tríggjar fløgur í 2000 og 2001, sum allar hava nátt hvør sínum gull-plássi.

Áhoyrarar streyma til konsertirnar og dansikvøldini saman við Heidi, og ikki so sjáldan er neyðugt at steingja hurðarnar, tí fultsett er.

**Væl umtókt í Føroyum**

Absalon Vatnhamar, sum tekur sær av fyrireikingunum fyri Kaggan, sigur, at Heidi er sera væl umtókt í Føroyum í løtuni, og tí vænta Kaggin og TB, at dansikvøldini, 7. juni á Tvøroyri og 8. juni í Havn, verða væl vitjað.

– Hon er nógv at hoyra í Útvarpi Føroya og kanska ov nógv á Rás2, sigur Absalon.

Hann veit annars at siga, at Heidi Hauge einaferð hevur vitjað í Danmark, og tá undirhelt hon fyri fullum húsi av fólki.

Hetta er so fyrstu ferð, at norska countrydrotningin kemur til Føroya.

# Bíggjarkórið konsert í Bø og í Sandavági dýrabiðidag

KÓR
*Tíðindaskriv*

Nakað fyri seinastu jól savnaðust fólk í Bø at vita, um tað mundi bera til at fáa í lag eitt kór at syngja jólasálmar í kirkjuni sunnudagin millum jól og nýggjár.

Tiltakið var so væleydnað, at fólk fingu hug at hittast aftur nakrar ferðir til framhaldandi kórsang. Og nú í morgin, dýrabiðidag, bjóðar kórið til konsert í Bíggjar Kirkju kl.17.00, sum verður endurtikin í Sandavágs Kirkju um kvøldið, kl. 20.00.

Á skránni eru sálmar, føðilandssangir og vársangir, nakrir norðurlendskir kórsangir og onkur altjóða kirkjukórsatsur frá eldri tíð.

# Spennandi blákrossvikuskifti í Leirvík!

**Tíðindaskriv**

»Í hondum leirkerasmiðarins« er slagorðið fyri aðalfundin hjá Bláa Krossi Føroya í ár, sum verður hildin komandi vikuskifti 4.-5. mai í missiónshúsinum í Leirvík. Í sambandi við aðalfundin verður skipað fyri nógvum áhugaverdum og spennandi tiltøkum, bæði fyri ung og eldri og Blái Krossur leggur dent á, at øll tiltøkini eru almenn, so øll eru hjartaliga vælko-min, bæði blákrosslimir og ikki blákrosslimir.

**Spennandi ungdómsmøti**

Tiltøkini í sambandi við aðalfundin byrja leygarmorgunin kl. 11.00 við bíbliutíma, har Thomas Dam fer at tosað um evnið: Hevur leirkerasmiðurin vald á leirinum? Eftir døgurða kl. 14.00 verður sjálvur aðalfundurin, har skráin verður smb. viðtøkum felagsins. Kl. 16.00 verður fundur og orðaskifti um arbeiði í teimum staðbundnu blákrossfeløgunum kring landið og kl. 20.00 leygarkvøldið skipar BKU fyri spennandi ungdómsmøti undir heitinum: Í húsum leirkerasmiðarins. Á skránni verður m.a. andakt, sangur, lovsangsbólkur, kór, filmur, upplestur, frágreiðing og ein leikur.

**Blái Krossur 125 ár**

Sunnumorgunin kl. 11.00 verður gudstænasta við altargongd í Leirvíkar kirkju, har Sverri Steinhólm prestur prædikar. Kl. 14.30 verður familjumøti, sum BKU skipar fyri og har barnakór luttekur. Kl. 16.30 verður skipað fyri kunning um Altjóða Bláa Kross í smb. við, at felagsskapurin seinni í ár fer at hátíðarhalda sín 125 ára føðingardag.

**Hugnalig samvera**

Tiltøkini í sambandi við aðalfundin í Leirvík enda sunnukvøldið kl. 19.00 við hugnaligari samveru, har skráin er bæði fjølbroytt og spennandi: Torleif Johannesen talar um evnið: Í hondum leirkerasmiðarin. Stutt kut um fjølbroytta virksemið hjá Bláa Krossi verða framløgd. Fyrrverandi misnýtari sigur frá lívi sínum. Eisini koma kór og sangbólkur at luttaka og landsnevndar-formaðurin, Sverri Steinhólm endar.

**Máltíðir og barnaansing**

Neyðugt er at tekna seg á Blákrossskrivstovuni tlf. 44 93 43 um ein ynskir døgurða ella nátturða. Um fólk ynskja tað, er eisini møguleiki at fáa innivist hjá privatfólki. Meðan tiltøk eru fyri vaksin, verður skipað fyri barnaansing við ymiskum virksemi, undirvísing, ítrivi o.ø.


FERÐAÆTLAN - SUMMARIÐ 2002
Tyrlutænastan

| SUNNUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 12.00 |
| Gásadal | 12.06 |
| Mykines | 12.12 |
| Vágar | 12.23 |
| Vágar | 13.00 |
| Koltur | 13.07 |
| Tórshavn | 13.12 |
| Skúvoy | 13.27 |
| Dímun | 13.32 |
| Skúvoy | 13.37 |
| Tórshavn | 13.52 |
| Klaksvík | 14.04 |
| Klaksvík | 15.00 |
| Svínoy | 15.12 |
| Kirkja | 15.16 |
| Hattarvík | 15.19 |
| Klaksvík | 15.37 |
| Tórshavn | 15.49 |
| Koltur | 15.54 |
| Vágar | 16.01 |

| MIKUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Skúvoy | 11.37 |
| Dímun | 11.42 |
| Froðba | 11.51 |
| Froðba | 12.40 |
| Dímun | 12.49 |
| Skúvoy | 12.54 |
| Tórshavn | 13.09 |
| Klaksvík | 13.21 |
| Svínoy | 13.33 |
| Kirkja | 13.37 |
| Hattarvík | 13.40 |
| Klaksvík | 13.58 |
| Klaksvík | 14.45 |
| Tórshavn | 14.57 |
| Koltur | 15.02 |
| Vágar | 15.09 |

| FRÍGGJADAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Skúvoy | 11.37 |
| Dímun | 11.42 |
| Froðba | 11.51 |
| Froðba | 12.40 |
| Dímun | 12.49 |
| Skúvoy | 12.54 |
| Tórshavn | 13.09 |
| Klaksvík | 13.21 |
| Svínoy | 13.33 |
| Kirkja | 13.37 |
| Hattarvík | 13.40 |
| Klaksvík | 13.58 |
| Klaksvík | 14.45 |
| Tórshavn | 14.57 |
| Koltur | 15.02 |
| Vágar | 15.09 |
| Vágar | 15.25 |
| Gásadal | 15.31 |
| Mykines | 15.37 |
| Vágar | 15.48 |

| Prísir | Mykines | Gásadal | Vágar | Koltur | Tórshavn | Skúvoy | Dímun | Froðba | Klaksvík | Svínoy | Hattarvík | Kirkja |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mykines | | 85,- | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Gásadal | 85,- | | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Vágar | 145,- | 145,- | | 130,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Koltur | 290,- | 290,- | 130,- | | 85,- | 215,- | 215,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- |
| Tórshavn | 215,- | 215,- | 215,- | 85,- | | 130,- | 130,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- |
| Skúvoy | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | | 85,- | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Dímun | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | 85,- | | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Froðba | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 85,- | 85,- | | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Klaksvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | | 110,- | 110,- | 110,- |
| Svínoy | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | | 110,- | 110,- |
| Hattarvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | | 85,- |
| Kirkja | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | 85,- | |

Galdandi frá 1. mai til 1. oktober

BÍLEGGING
Tel 34 10 10
Fax 34 10 01
Mán. - Frí.
Kl 08.00 - 16.00
Sun.
Kl. 12.00 - 16.00

BØRN
0 - 6 ár: Ókeypis
7 - 13 ár: 50%

VIÐFØRI
Í mest lagi 20 kg.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo